Rigsombudsmanden på Færøerne

# Kontorelev til Rigsombudet

Rigsombudet søger en kontorelev indenfor området »Offentlig forvaltning – Stat«. Stillingen ønskes besat 1. september i år eller efter nærmere aftale.

**Vi forventer**
- at du har HH-eksamen, eller har studentereksamen eller HF suppleret med Handelsskolernes 18 ugers kursusforløb
- at du er god til at formulere dig mundtligt og skriftligt, på såvel færøsk som dansk
- at du er selvstændig, initiativrig og har gode samarbejdsevner
- at du har godt kendskab til EDB

**Vi tilbyder**
- en 2-årig uddannelse inden for kontorfaget
- en god og kvalificeret elevplads med et veltilrettelagt uddannelsesforløb der berører alle Rigsombudets kontorfunktioner
- mulighed for deltagelse i den egentlige sagsbehandling på det familieretlige område
- løn efter overenskomst mellem Finansministeriet og HK-forbundet i Danmark

Elevtiden omfatter i alt 15 ugers skoleophold i Danmark. Rejse og ophold betales af Rigsombudet.

Du kan få yderligere oplysninger om stillingen ved at henvende dig til fuldmægtig Dan M. Knudsen eller kontorfuldmægtig Anna Weihe på telefon 35 12 00 mellem kl. 10 og 14.

Skriftlig ansøgning med kopi af eksamenspapirer m.v. sendes til Rigsombudet, Postboks 12, 110 Tórshavn. Ansøgningsfristen er mandag den 5. juli 2004.

**Rigsombudsmanden på Færøerne**

**Birgit Kleis**

## IKKI AVHEINTAÐIR VINNINGAR Á SØLUSTEVNUNI Í TRONGISVÁGI

ATGONGUMERKI

| | | |
|---|---|---|
| FRÍGGJADAG | BLÁTT | NR. 525 |
| LEYGARDAG | GRØNT | NR. 720 |
| LEYGARDAG | GRØNT | NR. 758 |
| LEYGARDAG | GRØNT | NR. 265 |
| SUNNUDAG | REYTT | NR. 1022 |
| SUNNUDAG | REYTT | NR. 32 |

LUTASEÐIL NR. 9815

VINNINGARNIR SKULU AVHEINTAST INNAN 30 DAGAR

IKKI AVHEINTAÐIR VINNINGAR FELLA AFTUR TIL FYRISKIPANDI FELØG

**RINGJAST KANN TIL:**
**JÓAN PETUR OLGARSSON Á TLF. 220 313**

SØLUSTEVNAN Í TRONGISVÁGI 2004

# MASKINMEISTARASKÚLIN

*tín møguleiki - títt val*

## Maskinmeistaraútbúgvingin

***Byrjar 2. august 2004***

Maskinmeistaraútbúgvingin er mest fjølbroytta, hægri yrkisútbúgving, sum kann fáast í Føroyum, og gevur sera stórar møguleikar bæði á sjógvi og landi, umframt innan oljuvinnuna, har maskinmeistarar t.d. er størsti yrkisbólkur.

Útbúgvingin er nakað broytt, soleiðis at tað nú er neyðugt frammanundan at velja, um ein ynskir at verða maskinistur ella maskinmeistari. Upptøkan til maskinmeistara verður í august men nýggi maskinisturin byrjar fyrst í januar 2005.

Báðar útbúgvingarnar verða moduluppbygdar. Tað tekur framvegis 1 ár at lesa til maskinist og 3 ár til maskinmeistara. Upptøkutreytirnar eru framhaldandi tær somu.

Hevur tú hug at gerast maskinmeistari, so kanst tú seta teg í samband við skúlan, so senda vit tær upplýsingar um upptøkutreytir og lesturin saman við umsóknarblaðnum.



**MASKINMEISTARASKÚLIN**
Undir Krákugjógv 5, FO-100 Tórshavn,
tlf. 312661, fax 318545
E-mail: mms@mec.fo, Heimasíða: www.mec.fo

# Til sølu



Ein beige littur Honda CR-V frá apríl 1999, ið hevur koyrt 64.834 km, verður seldur um hóskandi boð fæst.

**Ring 22 86 06**

# Frá valnevndini fyri Vágs skúla

Til skúlastýrisvalið 25. mai eru hesi valevni uppstillað:

Anna Djurhuus, Porkeri
Harriet Joensen, Vágur
Arni Georg Johansen, Vágur
Eyðbritt Krosslá, Vágur
Anna Br. Samuelsen, Vágur
Egill Steintórsson, Vágur

**Valnevndin**

# Starlet 29



**Um hóskandi boð fæst, er ein Starlet 29 við 113 Hk/6 cyl.**

Thornycroft motori,
6 heilautom. oljutr. snellum,
línuspæli, 16 fj. radara, litekkoloddi,
GPS við korti og stórum skermi,
gummibáti og sjálvstýrara til sølu.

Báturin hevur fiskiloyvi 5B.

**Tlf. 318949 (eftir kl.21)**

## SKJÓTTGANGANDI BAY-LINER 2255 SUNBRIDGE

...bíliga til sølu - fyri hægstbjóðandi



**Ringið og hoyri nærri**
**TEL 77 00 86**

# Skúlastýrisval

Val av foreldraumboðum til skúlastýrið við Vestmanna Skúla verður týsdagin 25. mai 2004.

Atkvøðugreiðslan fer frma á kommunuskrivstovuni frá kl. 13.00 til 19.00.

Yvirlit yvir valevnir og stillarar er at síggja í kunngerðartalvuni hjá kommununi og verður eisini at síggja í atkvøðuhølunum valdaging.

**Valnevndin**

# Handil til sølu

Spennandi handil, sum selur klæðir o.a. til ung í øllum landinum til sølu.

Handilin liggur sera væl fyri í miðbýnum í Havn.

**Áhugað kunna ringja tlf. 516007**



Tekniski Skúlin Klaksvík

# Undirvísari

Søkt verður eftir yrkislærara til útbúgvingar innan el- og maskinøkið, at undirvísa handverkslærlingum, SIT- og HT-næmingum.

**Førleiki**
Ynskiligt er, at umsøkjarin er útbúgvin innan maskin- og el-økið. Maskinmeistaraprógv og arbeiði sum el-innleggjari í minst 2 ár er ein fyrimunur.

**Setanartreytir**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Føroya Tekniska Lærarafelag, lønartalva I og II.

Tikið verður við starvinum 9. august 2004

**Spurningar**
Áhugaði kunnu fáa meir at vita við at venda sær til Rúna Heinesen, skúlastjóra

**Freist**
Umsókn skal sendast skúlanum í seinasta lagi 9. juni.

Umsókn sendast:

**Tekniski skúlin í Klaksvík**
Postrúm 20
FO-700 Klaksvík

www.alval.fo

# SKRIVSTOVUFÓLK



ALVAL er ein minni fyritøka, sum liggur væl fyri á sjálvum havnalagnum á Tvøroyri, har vit hava goymslu, umsiting og sølu

ALVAL hevur sum høvuðsendamál at veita heildartænastu til vinnulívið í Suðuroynni.

Søkt verður eftir fólki til skrivstovu okkara, at arbeiða uml. 20 tímar um vikuna.

Starvið umfatar vanligt skrivstovuarbeiði, bókhald, debitorrøkt og kundaavgreiðslu.

Starvið er tímalønt eftir sáttmálanum hjá S&K.

Umsókn við møguligum prógvum og ummælum skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 4. juni 2004.

ALVAL

Havnalagið
Postsmoga 107
FO-800 Tvøroyri

Telefon: +298 372186
Telefax: +298 372286

Heimasíða: www.alval.fo
Teldupostur: alval@alval.fo

## Sjúkrakassi Fuglafjarðar Læknadømis

# Stongt

Vegna feriu er Sjúkrakassi Fuglafjarðar Læknadømis stongdur frá 27. mai til og við 11. juni 2004.

FØROYA LANDSSTÝRI

## Mentamálaráðið

*Fólkaskúladeildin*

# Endurlýsing
# Fyribilsstarv sum fyrstilærari í Eiðis skúla

**Í sambandi við at fyrstilærarin fer í farloyvi verður starvið sum fyrstilærari í Eiðis Skúla lýst leyst til setanar í tíðarskeiðnum 1. mars 2004 - 1. mars 2005.**

**Í Eiðis skúla eru 82 næmingar í 7 árgangum. 9 lærarar starvast í skúlanum.**

**Søkt verður eftir fyrstalærara, sum**
- undir ábyrgd skúlamyndugleikanna skal hava fyrisitingarligu og námsfrøðiligu leiðsluna av virksemi skúlans
- skal sýna leiðslumyndugleika og -hegni
- dugir at samstarva og er fyrikomandi
- er kveikjandi í sínum skúlahugsanum og hevur hugsjónir um skúlamenning
- á fólkaræðisligum støði skal fremja góðar arbeiðsumstøður og gott samstarv millum næmingar, lærarar og onnur samstarvsfólk
- er førur fyri at skilja støðuna hjá øðrum.

**Harumframt skal fyrstilærarin**
- hava hug og hegni til at átaka sær fyrisitingarliga ábyrgd
- leggja dent á at fremja andsfrælsi, tolsemi og gott samarbeiði millum skúla og heim
- vera førur fyri at loysa trupulleikar
- vera førur fyri at røkja og menna starvsfólkasamstarvið
- vera førur fyri at útinna starvsfólkaleiðslu
- skapa virðing fyri skúlanum og umstøður hjá tí einstaka fyri medávirkan og medábyrgd
- leggja dent á menning av skúlaskapinum í kommununi
- eggja næmingum, foreldrum og lærarum til at leggja doyin á at fáa sum mest burtur úr skúlagongdini bæði fakliga og sosialt.

**Førleikakrøv**
Umsøkjari skal hava fólkaskúlalæraraútbúgving og starvsroyndir í fólkaskúlanum.

**Lønar- og setanartreytir**
Setanarøkið er undir Mentamálaráðnum í Eysturoyar skúladømi III við fyribils tænastu í Eiðis skúla. Tann, ið sett/-ur verður, eigur at tola broytingar starvinum viðvíkjandi.

Starvið verður lønt í lønarflokkunum 27.3, 29.1, 31.1 og 31.2 sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag. Starvið verður sett sum sáttmálasett starv uttan so, at tann sum sett/-ur verður, er tænastumannasettur lærari frammanundan.

Skylduga undirvísingartímatalið verður ásett eftir galdandi reglum.

**Umsóknir**
Umsókn, sum liggur á heimasíðuni www.mmr.fo, skal vera Mentamálaráðnum í hendi **í seinasta lagi týsdagin 23. mars 2004.**

Um tú ynskir fleiri upplýsingar um starvið, kanst tú ringja til Jenny Lydersen, undirvísingarleiðara ella Olaus Jespersen, deildarstjóra.

**8. mars 2004**

**Mentamálaráðið - Hoyvíksvegur 72**
Postrúm 3279 - 110 Tórshavn
Telefon 355050 · Fax 355055
e-postur: mmr@mmr.fo

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

# Sanglegat

Sanglegatið til minnis um Sonnu Dahl Waagstein letur stuðul til sangarar, sum hava víst serstakar gávur, og sum ætla at útbúgva seg meira í solosangi.

Meiri fæst at vita um stuðulin frá Jákupi Simonsen, deildarleiðara á trivnaðarfyrisitingini, tlf. 31 51 60.

Umsóknir skulu sendast nevndini í seinasta lagi 12. juni 2004. Sanglegatið til minnis um Sonnu Dahl Waagstein, Postrúm 32 - 110 Tórshavn.

SNARSKIVAN

# GUNNAR MIKKELSEN & SHOWMENN



**í TB-húsinum leygarkvøldið 22. mai kl. 24-04**



Nýggja fløgan hjá Gunnari
"The Best Piece Of Advice Always Comes A Little Too Late"
kom út tann 17. mai

Stuðla tiltakinum hevur
ATLANTIC AIRWAYS